Viðmerking:

Nýggj nevnd í foreldrafelagnum

Foreldrafelagið *felagið fyri foreldur at smábørnum í Havn,* hevði aðalfund í mai mánaða í ár. Fýra nýggj fólk vórðu vald í nevnd, meðan ein frá gomlu nevndini varð aftur-valdur. Nýggja nevndin hevur skipað seg soleiðis: Sámal T.F. Johansen, formaður, Inna Sigvardsen, næstforkvinna, Høgni í Stórustovu, kassameistari, Guðrið Ellefsen, skrivari og Rigmor Dam, nevndarlimur.

Aðalmálið: fleiri ansingarpláss

Felagið hevur nú virkað í trý ár. Hóast nógv arbeiði hevur verið lagt í at loysa trupulleikanar á ansingarøkinum, eru teir tíverri enn líka stórir ella kanska størri enn áður. Sjálvt um nýggj ansingarpláss eru og verða sett á stovn í Havn er bíðilistin kortini longri nú enn nakrantíð. Tí verður aðalmálið hjá felagnum komandi árið, eins og undanfarnu ár, at fáa økt talið av nýggjum ansingarplássum munandi.

Onnur mál

Nýggja nevndin hevur eisini sett sær onnur mál at røkka. Eitt av hesum málum er at kanna møguleikarnar fyri at Tórshavnar kommuna kann gera fleiri íløgur í barnaansing. Eitt annað er at vísa á tørvin fyri broyting í lógini um barnsburðarfarlovyi, so at tað samsvarar betri við møguleikarnir fyri barnaansing í kommununi. Eitt triðja er at fáa kjak um verandi upptøkutreytir og mannagongdir. Eitt fjórða er at fáa Tórshavnar kommunu at betra um kunningina um pláss og bíðilista á ansingarøkinum.

Hví verða limir í Foreldrafelagnum?

Umleið 470 børn standa á bíðilista til ansingarpláss í Tórshavnar Kommunu. Hetta merkir at tað eru nógv foreldur sum kenna sviðan av manglandi plássi. Limatalið hjá felagnum er eisini vaksi støðugt síðani tað varð stovnað. Í dag eru uml. 100 limir, men hetta talið eigur at verða nógv hægri. Vit heita tí á fólk um at gerast limir. Limagjaldið er kr. 100,- um árið og kann gjaldast á konto 9181-127127.1 í Føroya Sparikassa.

Limafundur í heyst

Í heyst verður skipað fyri limafundi. Evni á fundinum verður trupulleikanir á ansingarøkinum, við serligum denti á hvat politisku mynduleikanir ætla at gera fyri at loysa hesar. Ætlanin er at bjóða umboð fyri ymisku listanar, sum eru uppstillaðir til komandi býráðsval í Havn, til eitt orðaskifti um hetta evni. Øll eru vælkomin. - Nærri boð um limafundin koma eftir summarfrítiðina., sigur nevndin í tíðindaskrivi.

Postverkið

Hóast uppskotið viðvíkjandi postverkinum bara snýr seg um eina eykajáttan til rakstur, roynir formaðurin í fíggjarnevndini og landsstýrismaðurin í vinnumálum at draga inn í nevndarviðgerðina onnur viðurskifti, sum einki hava vit hetta mál at gera. Teir gera nógv burtur úr at gera postverkið til alment partafelag, hóast tað ikki er politisk semja í samgonguni um hetta. Tað kann tykjast løgið at fara at skriva álit um eitt mál, sum ikki er lagt fyri tingið.

Tað, sum tjóðveldisflokkurin hevur kravt viðvíkjandi postverkinum, er, at starvsfólkið verður tikið við upp á ráð, hvat er besta loysnin. Tað, sum øllum politikarum er kunnugt, er, at postverkið er niðurpínt fíggjarliga seinastu árini.

Postverkið var á fíggjarlógini í nógv ár, fyrst í 90'unum var lítil og eingin játtan. Tá játtanin var hægst í 80'unum, var talan um einar 19 milliónir um árið. Tað er tí púra greitt, at verkið er niðurpínt fíggjarliga í gjøgnum nógv harrans ár.

Tað er tí stórur tørvur á íløgum í viðlíkahald av bygningum og nýmótans tøkni. Støðan er tí tann, at Postverk Føroya er langt aftanfyri, um vit samanbera okkum við hini norðurlondini, sum fyri mongum árum síðani sum almennir stovnar eru útbygdir við nútímans tøkni.

Tað kann tí als ikki góðtakast, tá sagt verður, at tað er nøkur loysn at gera postverkið til partafelag í verandi fíggjarstøðu. Tað er tí ein stórur spurningur, um politikarar eru til reiðar at játta tað, sum skal til, fyri at Postverk Føroya kann yvirliva sum partafelag undir teimum treytum, sum partafelagslógin setir.

Postverk Føroya er í dag stovnur undir Føroya Landsstýri við tí endamáli, sum lógin frá 1976 setir. Tað vildi verið ein stór skomm, um P/F Postverk Føroya fór á heysin. Úrslitið av hesum vildi verið, at landskassin hevði verið noyddur at keypt egnu ogn sína aftur við stórum tapi.

Tær royndir, sum vit hava

av at skipa eitt ávíst prosjekt í eitt alment partafelag, eru skakandi. Landsstýrismaðurin hevur við hesum frásagt sær og komandi landsstýrismonnum alla ábyrgd til eina nevnd, sum hann sjálvur hevur valt til at gera tað, sum hann sjálvur ikki torir. Løgtingið hevur eisini mist sína ávirkan, við tað at Løgtingið ikki kann draga nevndina til svars á sama hátt sum landsstýrismannin.

Hetta hevur higartil kostað landskassanum eitt tvísifrað millióntal. Ikki nokk við tí. Arbeiðið er av hesi orsøk seinkað í meira enn hálvtannað ár. Her er talan um P/F Vágatunnilin. Landsverkfrøðingurin, sum sambært lógini skuldi hava eftirlit við arbeiðinum við ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum, er skúgvaður til síðis, við tað at teirra tilmæli ikki verður tikið til eftirtektar.

Í 80'unum var tað inn, at geva landskassaveðhald til privatar fyritøkur. Nú sær tað út til, at tað er inn at stovna almenn partafeløg við landskassanum í ryggjinum til at reka almennar stovnar av privatum.

Sum orðatakið sigur: Tað er vandi í hvørjair vælferð. Tað skuldi ikki undrað meg, um landskassin kemur at hanga upp á hesi feløg uttan at hava ávirkan á tað, sum fer fram.

Heine O. Heinesen

Ein tøkk til Blákrossheimið

Eg havi verið á Blákrossheiminum og fingið góða hjálp fyri mín rúsevnistrupulleika.

Eg eri rasandi yvir tað, sum verður skrivað um Blákrossheimið í Oyggjatíðindum, tí alt, sum skrivað er, er ósatt.

Blákrossheimið hevur hjálpt mongum fólkum.

Starvsfólkið á Blákrossheiminum skuldi fingið premiu, fyri teirra stríð.

Sólborg gevur okkum øllum kærleika, uttan mun til hvør ein er.

Sólborg og hini starvsfólkini hava sanniliga stríðst fyri at hjálpa okkum alkoholikarum. Tað hevur givið bonus. Nógv eru nú turrlagd.

At enda: Latið Blákrossheimið og starvsfólkini har fáa frið!

Hetta skrivi eg fyri meg sjálva, og eg ivist ikki í, at hini búfólkini, sum hava verið á Blákrossheiminum og fingið hjálp, halda við mær.

Vinarliga
Elma Fornagarð

Skulu føroyingar aftur gerast størstu skuldarar í Heiminum?

80 ara flokkarnir - loysingarflokkarnir, tykjast onki hava lært av kreppuni. Nú hava teir sanniliga í hyggju, at taka „loysing uppá lán". Hevði danska stjórnin sagt ja, vórðu føroyingar aftur størstu skuldarar í Heiminum.

Núverandi samgonga er nú vorðin ein beinleiðis forðing fyri neyðugum broytingum í ríkisrættarligu viðurskiftunum: Teir hava arbeitt við málinum í gott 2 ár. Higartil er púrt onki komið burturúr „smølu semjuni", ið greitt hevur ein breiðan meiriluta av føroyingum ímóti sær. Og høvdu teir fingið sína „loysn", so hevði henda verið feld av einum stórum meiriluta av føroyingum, ið ynskja eina góða loysn innan karmarnar av Ríkisfelagsskapin. Ríkisfelagsskapurin er nevniliga gull verdur fyri allar føroyingar.

• Um Sambandsflokkurin sat við róðrið, høvdu vit í sátt og semju fingið broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum innan Í ár var farið - í Ríkisfelagsskapinum. **Og uttan lántøku.**

• Um landstýrið vil loysa, og varðveita livistøði, má milliarda lántøka til, ið eftirkomarar okkara skulu gjalda aftur við rentum.

• Hin møguleikin er, at lækka livistøði føroyinga niður í botn.

• Seinasta útspæl um tíggjutala milliarda lántøku vísir okkum greitt, at Landstýrið hevur tikið til eftirtektar tað, ið Sambandsflokkurin hevur ført fram. Nevniliga, at loysingin kostar so nógv, at peningur ikki er at gjalda vælferðina, ið tí má fíggjast við lántøku. Bert fyri at varðveita tað livistøði, skúla, heilsuverk og socialar veitingar, ið vit hava ídag. Um lánið ikki verður tikið, so verða hundratals milliónir pumpaðar úr heilsu, skúla, almanna og heilsuverki. Til stóran skaða fyri alt samfelagið, men serliga tey í verða rakt av arbeiðsloysi, minkandi veitingum og øðrum vanlukkum sum fráflyting o.ø. Áttu vit ikki heldur at bøtt um viðurskiftir føroyinga?

Vit hava ídag ein sjálvberandi búskap:

Neyðugt er at skilja ímillum, at hava

• ein sjálvberandi búskap innan Ríkisfelagsskapin

• ein sjálvberandi búskap uttanfyri Ríkisfelagsskapin (í Fullveldinum)

• Sjálvberandi búskapur er, at inntøkur svara til útreiðslur:

• Í dag hava vit ein sjálvberandi búskap - í Ríkisfelagsskapinum: Tað gongur væl fíggjarliga. Vit megna allar okkara skyldur og hava umframt eitt yvirskot. Vøkstur er í føroyska búskapinum, og hesin vøkstur kann halda fram innan Ríkisfelagsskapin, um Landstýri ger rammur, ið føroyingar kunnu arbeiða undir.

• Skipanin vit hava ídag. er so mikið góð fyri Føroyar, at loysingarsamgongan ikki kann lata vera við at breggja sær av hvussu gott tað gongur. Tí er tað meira enn marghátttligt, at skera á háls eina góða skipan innan Ríkisfelagsskapin, fyri at seta í verk eina ónýtiliga loysingarskipan, hvørs grundarsteinur er milliarda lántøka - ið okkara eftirkomarar skulu gjalda aftur við rentum.

• Um loysast skal, so fáa vit ein annan sjálvberandi búskap, har fíggjarlógin minkar við eini 1600 milliónum krónum eftir 4 árum. Einhvør veit, at tað fær stórar avleiðingar fyri samfelag okkara. Vit fáa ein sjálvberandi búskap á einum „øðrum støði" enn vit hava ídag. Einum nógv lægri støði.

• Men eins og vit eru- og skulu vera - sjálvberandi innan ríkisfelagsskapin ídag, so skulu vit vera sjálvberandi uttanfyri. Tí má livistøði niður, um vit fara úr Ríkisfelagsskapinum. Ella má stór lántøka til, at halda livistøði óveruliga høgt.

Fullveldið: 80ini umaftur - í stórum stíli: Fullveldið vil tí, eftir seinasta, at kalla óhepna, „uppskoti" Landstýrisins, vera 80ara politikkur við feitari skrift. Vælferð uppá milliarda lán. Tí betur segði Nyrup nei. Tað skal hann hava tøkk fyri. Vit skulu ikki hava vælferð uppá lán og gerast heimsins størstu skuldarar aftur!

Hava tit onki annað at koma við, so leggi frá tykkum. Tí aðrir stórir flokkar eru,ið hava eina veruliga loysn á Ríkisrættarligu viðurskiftunum, ið ikki skal gjaldast aftur við rentu! Nevniliga eini loysn innafyri Ríkisfelagsskapin.

Ongin við sínum fullu fimm slaktar hønuna, ið verpir gullegg - tí má Ríkisfelagsskapurin ikki slaktast!

Vinarliga Marjus Dam,
løgtingsmaður

Hesuferð á Jóansøku

Høgni Mohr

Felagsskapurin, ið roynir at kunna føroyingar um fullveldi, er sera virkin, nú summarstevnurnar eru. Á eystanstevnu skipaði felagsskapurin fyri fólkafundi, og aftur komandi vikuskiftið fer Hesuferð at skipa fyri fundi um hetta stóra og eyma mál. Hesaferð verður Hesuferð í Vági, har jóansøkan verður hildin.

Fólkafundurin á jóansøku verður sunnudagin kl. 15.00 við minnisvara teirra sjólatnu. Røðarar eru Jóhanna í Ólavsstovu og Jóanes Nielsen. Umframt røður, verður eisini skipað fyri felagssangi.

ÍtróttUr
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Vit skora ikki

Hóast hann einki trýst kendi á sær undan dystinum, so helt Bárður Mortansson tó, at úrslitið hjá HB kundi verið betri sunnudagin



- vit ikki skora upp á teir møguleikar, sum vit fáa, og tá teir so fáa síni mál í fyrra hálvleiki, er dysturin sum so liðugur fyri okkara viðkomandi
Mynd: Álvur Haraldsen

Jákup Mørk

Mest sjónligi leikarin hjá HB sunnudagin var uttan iva lítli, men kviki, áleyparin, Bárður Mortansson.

Bjóðaði av

Ferð eftir ferð royndi hann at bjóða mótstøðumonnunum av, og við skjótleika sínum megnaði hann eisini at skapa vandamiklar støður, tá bólturin varð stungin inn um mótstøðuverjuna. Eydnan var tó ikki við honum, tá hann miðskeiðis í fyrra hálvleiki slapp leysur móti málverjanum, og fyrsta altjóða málið í HB búnanum má tí bíða nakað aftur.

Eins og restin av HB liðnum, so megnaði Bárður tó ikki tað stóra, tá teir 90 minuttirnir vóru um at vera lidnir, og seinastu løtuna var ikki nógv orka til teknisku snildirnar.

Til at tosa við

Eftir dystin hittu vit ein sjónliga troyttan Bárð, og spurdu vit hann, hvussu hansara fatan av dystinum var:

- Eg haldi, at teir so avgjørt vóru til at tosa við, og serliga í verjupartinum tóktust teir ikki at vera so øgiliga vel fyri. Trupulleikin er tó, at vit ikki skora upp á teir møguleikar, sum vit fáa, og tá teir so fáa síni mál í fyrra hálvleiki, er dysturin sum so liðugur fyri okkara viðkomandi.

Hinvegin hevði dysturin ikki tann heilt stóra týdningin hjá okkum, og vit hava heldur ikki merkt nakað trýst frá hvørki leiðslu ella venjara um, at málið var at koma víðari ella nakað líknandi.

Tað hevur verið nógv tosað um aldurin á HB liðnum í ár, og tað er eisini ein sannroynd, at nógvir av leikarunum á vøllinunum í dag høvdu lítlar ella ongar altjóða royndir. Heldur tú eisini, at hetat ávirkaði avrikið?

Ja, móti endanum vóru vit rættuliga nógvir ungir leikarar á vøllinum, og so eru royndirnar sjálvandi ikki til staðar. Hinvegin haldi eg ikki, at hetta hevur gjørt nakran skaða. Týdningarmesta hjá okkum í dystinum var nevnliga at fáa nakrar royndir, og so sjálvandi eisini at spæla eitt sindur á grasi. Í so máta var hetta eitt slag av roynd undan steypafinaluni.

At spæla á grasinum er eisini heilt ørðvísi, enn tá spælt verður á graslíki. Her ber í nógv størri mun til at renna longu sendingarnar upp aftur, og hetta haldi eg er størsti munurin hjá okkum uppi í álopinum.

Hugsa um heimligu kappingina

Nú nevndi tú sjálvur steypafinaluna. Er hetta nakað, sum liggur frammaliga í hugaheiminum, ella hugsa tit eins nógv um dystin á útivølli móti Lombard?

Fyrst og fremst royna vit at hugsa um dystirnar í heimligu kappingini. Komandi dagarnir verða nakað strævnir. Fyrst hava ein framskundaðan dyst móti B71 at hugsa um, og í løtuni verður mest hugsa um hendan. Dystin í Ungarn hava vit so at siga slettis ikki tosaå um, og eg haldi vit hugsa nógv meira um steypafinaluna, sum verður eina viku seinni.

Endamálið við dystinum í Ungarn, verður tó helst tað sama. Nevnliga at fáa nakrar royndir, og so eisini at venja seg við grasið.

Góð úrslit aðrastaðni

Tá dysturin móti Lombard var lokin, vóru úrslitini fyri 9. umfar í fyrstu deild eisini greið, og einki er at dylja, at Bárður var fegin um hesi.

- Flestu úrslitini lagaðu seg væl fyri okkara viðkomandi, men eg rokni við, at KÍ fara at verða nakað drúgvir í seinnu hálvu.

Hann leggur tó dent á, at HB'liðið á ongan hátt ætlar at geva skarvin yvir í oddastríðnum. Hóast teir einki trýst kenna á sær, so fara teir á vøllin fyri at vinna í hvørjum dysti, og verður hugburðurin hin sami, sum hann hevur verið higartil í landskappingini, man tað neyvan fara at ganga heilt galið.



Tórsvøllur ger góðan mun

Peningarøkilin hjá HB er uttan iva fegin um, at heimadystirnar í europeiskum høpi nú verða leiktir á Tórsvølli

Jákup Mørk

Nógv hevur verið skrivað og sagt um Tórsvøll, síðani ætlanin av fyrstan tíð sá dagsins ljós, og ikki alt av hesum hevur verið líka positivt.

Fegin kassameistari

Ein er tó, sum uttan iva er fegin um nýggja vøllin, og tað er peningarøkilin hjá HB.

At heimadystirnir hjá HB í europeiskum høpi verða leiktir á Tórsvølli heldur enn á Svangaskarði, hevur í øllum førum við sær, at nakað væl meira av peningi streymar niður í kassan hjá vertunum.

50.000 eyka í kassan

Tá HB undanfarin ár leikti sínar dystir á Svangaskarði, vóru kanska um eini 300 fólk og hugdu, og av hesum mundu einir tveir triðingar hava fingið ymissløg av fríbillettum, soleiðis at tað einans mundu vera um 100 gjaldandi áskoðarar.

Til dystin sunnudagin móti Lombard FC, vóru á leið eitt túsund fólk og hugdu at, og um talið av ókeypis atgongumerkjum, sum verða latin sponsorum og øðrum, verður drigið frá, eru framvegis 800 fólk, sum hava goldið fyri at síggja dystin.

Tað vil við øðrum orðum siga, at HB man fáa góðar 50.000 kr. meira burtur úr at spæla á Tórsvøllu, enn teir høvdu fingið á Svangaskarði, og hetta man helst metast eitt plástur á sárið, eftir ítróttarligu avbukingina sunnudagin.

Nú sæst munur á

Annars er tað hugaligt at síggja, hvussu Tórsvøllur sjálvur er við at taka skap nú.

Asfalt er nú lagt á kring vøllin, og trappur og áskoðarapláss framman fyri komandi FSF húsið eru nú eisini komin upp á pláss.

Liðugur er vøllurin tó langt ífrá, men hóast alt røkist nú fyri, at vøllurin og kringstøðurnar eru um at taka skap, soleiðis at alt økið ikki longur er sum eitt byggipláss á at líta.

Enn eiga føroysk lið tó fyrsta sigurin á vøllinum til góðar. Nær hesin fer at koma er ilt at siga, men fyri føroyskan fótbólt er at vóna, at hesin ikki letur bíða alt ov leingi eftir sær.